

## Søgubrot: Sjáldsom hending í Grønlandi

Brandur Sigmundarson, sum varð bygdur Frederikshavn í 1960, var fyri sjáldsamari hending í Godthåbsfjørðinum. Tað var sera ringt veður og siglt var nær landi at kroka. Tá ið teir komu nær landi og skuldu bakka, vildi maskinan ikki tí ein trolveirur var komin um skrúvuna. Tíbetur fyri teir, lá Vágbingur, ið Poli Johannesen førdi nærhendis, ið kundi sleipa stóra trolaran upp ímóti vindinum, soleiðis at skorið bleiv av skrúvuni. Hetta eydnast til fulnar eftir einum hálvum tíma. Trolarin kostaði um 6 mió krónur at byggja, og var annars fyrsti føroyski trolarin, ið royndi í Kanadiska flógvanum í 1961. – Hetta fekk stóran týdning fyri aðrar bátar her á landi. Fiskað varð ikki sunnudag, skrivar heimasíðan bkv.fo.



# Fjarstøða

**- Eg veit um ótrúliga nógvar íslendingar, sum annaðhvørt vilja ella beinleiðis ætla sær til Føroyar einaferð í lívinum. Nú fáa føroyingar eisini ein góðan møguleika at vitja grannarnar norðanfyri, sigur Henny á Líknagøtu, marknaðarleiðari hjá Atlantsflogi**

FERÐAVINNA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Reykjavík/Vágar:** - Tað er einfalt og ódýrt at fara til Íslands. Og nú er tað haraftrat sera bíligt at vera har!

Øðrvísi kann tað ikki sigast, nú Atlantsflog av álvara er farið at spenna seg út til vetrarflúgvingina til grannalond okkara.

Við jøvnum millumbilum hevur felagið havt serstøk ferðatilboð til grannan fyri norðan. Og í hesum døgum verður gjørt eitt átak fyri at økja um talið á ferðafólkum til hesa brøðratjóð okkara.

Talið av ferðafólkum á Íslandsleiðini hevur verið í eini ávísari minking higartil í ár. Orsøkirnar til hetta kunnu vera fleiri, men ein orsøk er helst at fíggjarliga samstarvið millum londini bæði hevur verið í minking, millum annað tí at ein ávísur banki ikki arbeiðir í Føroyum í løtuni.

Men hesum veruleika og hesi afturgongdini ætla tey á marknaðardeildini í Atlantsflog ikki at lata fara aftur við borðinum.

Tað er nærum so, at fólk í Íslandi vilja sleppa til grannarnar fyri sunnan einaferð í lívinum.

- Nú fáa tey í øllum førum henda ódýra møguleikan, sigur Henny á Líknagøtu, marknaðarleiðari hjá Atlantsflogi.

Í vetrarhálvuni flýgur Atlantsflog tvær ferðir um vikuna millum Føroyar og Ísland – fríggjadag og mánadag.

### Góð tilboð

Marknaðardeildin hjá føroyska flogfelagnum merkir í hesum døgum, at áhugi er hjá íslendingum at koma til Føroyar, og ikki minst hjá føroyingum at vitja í Íslandi.

Felagið hevur í løtuni eitt tilboð til øll hesi áhugaðu fólkini, har til ber at ferðast til grannalandið og har møguleiki er at liggja nátt fyri ein rímiligan kostnað.

Til ber hjá íslendingum at koma til Føroyar fyri slakar 45.000 íslendskar krónur, og sum av fólki verður mett sum sera bíligt, tá ein hugsar um alt tað, ið ein fær fyri henda peningin.

Hinvegin ber til hjá føroyingum at fara á ein sjoppingtúr til Reykjavíkar ein

*Talið av ferðafólkum á Íslandsleiðini hevur verið í minking, men hetta ætlar føroyska flogfelagið at bøta uppá*